Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen
Bárður á Lakjuni
Árni Skaale
Beinir Johannesen
løgtingsfólk

Broytingaruppskot III

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 2.* Í sambandi við handilsliga ferðavinnu kann bóndin taka gjald."

2. § 5, stk. 3 og 4 verða strikað.

3. § 6, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
   "Allar kommunur skulu, saman viðkomandi áhugapørtum og í semju við bóndur, gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað og fyriskipað soleiðis, at tað í minst møguligan mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar."

4. Í § 7, stk. 3 verður "§ 5, stk. 3" broytt til: "§ 5, stk. 2"

Viðmerkingar
Mælt verður til, at ferðavinnuætlan skal gerast í semju við bóndur, og at bóndur kunnu taka gjald. Við 2. viðgerð varð samtykt eitt broytingaruppskot, har ásett varð í § 5, stk. 2, at bóndur kunnu taka rímuligt gjald fyri tænastur. Uppskotssetararnir halda, at henda áseting er ógreið og mæla tí til eina reina áseting, soleiðis sum skotið verður upp í § 5, stk. 2.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1
Við broytingini fær bóndin heimild at taka gjald, sum ikki er tongt at tænastu.

Ad. 2

Ásetingin um gjald verður flutt í stk. 2, og heimildin hjá landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um innihaldið í avtalum fyri virksemi og tænastur verður strikað.

Ad. 3
Ásett verður, at ferðavinnuætlanin skal gerast í samstarvi millum kommunur og aðrar viðkomandi áhugapartar og í semju við bóndur.

Ad. 4
Konsekvensbroyting.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jørgen Niclasen Jacob Vestergaard Bárður á Lakjuni

Árni Skaale Beinir Johannesen